# Nýtt ættarlið av løgtingsmonnum vinnur fram

**Á tveimum teimum seinastu løgtingsvalunum hevur stór útskifting verið í tingmanningini. Eldra ættarliðið er við at fána burtur, meðan eitt nýtt ættarlið av politikkarum brýtur fram. Tjóðveldisflokkurin hevur framt størstu útskiftingina**




LØGTINGSLIMIR

*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Flokkar og veljarar hava í 90 árunum lúkað í vallistunum, at støðan í tinginum í dag, at 18 av 32 tingmonnum, sum ikki hava meir enn fimm ára royndir á løgtingi. Hagtølini vísa greitt, at serliga síðan løgtingsvalið í 1998, hevur stór útskifting verið í tingmanningini. Ein kann av rötttum siga, at eitt nýtt ættarlið er á veg í føroyskum politikki

### Misjavnt

Tað er eitt sindur misjavnt, hvussu væl nýggja ættarliðið av føroyskum politikkarum er mannað í teimum ymisku flokkunum. Tjóðveldisflokkurin hevur framt størstu útskiftingina. Av tingmanningini hjá flokkinum í dag, er tað bert Hergeir Nielsen og Heini O. Heinesen, sum eru eftir av eldru Tjóðveldismanningini.

Menn sum Finnbogi Ísaksson, Signar á Brúnni og Jógvan Durhuus eru ikki longur partur av tingmanningini hjá Tjóðveldisflokkinum Við Høgna Hoydal á odda, hava nógvir nýggir politikkarar vunnið seg fram í Tjóðveldisflokkinum. Nøvn sum Høgni Hoydal, Tórbjørn Jacobsen, Kristina Háfoss, Anita á Fríðriksmørk og Páll á Reynatúgvu eru í dag framstandi nøvn í Tjóðveldisflokkinum.

Í Sambandsflokkinum eru eins og í Tjóðveldisflokkurin fleiri nýggj andlit at síggja. Nevnast kunnu Alfred Olsen, Bárður Nielsen, Johan Dahl, Kaj Leo Johannesen og Marius Dam, sum allir eru komnir á ting fyri Sambandsflokkinum eftir 1998.

Fólkaflokkurin og Javnaðarflokkurin hava verið eitt sindur trekari at skifta út. Rokna vit frá valinum í 1998, so eru Heðin Zachariassen, Jákup Mikkelsen, Jógvan á Lakjuni nýggjastu fólkaflokstinglimirnir. Fyri sama tíðarskeið eru tað bert Andrias Petersen, Gerhard Lognberg og Katrin Dahl Jacobsen, sum kunnu kalla seg nýggj í løgtingshøpi fyri Javnaðarflokkin.

### Eldra ættarliðið fækkast

Tað ættarliðið, sum í 1970 árinum varð nevnt fyri nýggja ættarliðið í føroyskum politikki eru við at fækka í tali. Óli Breckmann hevur, av tingmanningini í dag, sitið nógv longst. Síðan 1974 hevur formaðurin í tingbólkinum hjá Fólkaflokkinum verið í løgtinginum. Honum næstir eru Vilhelm Johannesen og Anfinn Kallsberg, sum komu fyri fyrstu ferð á ting í 1980.

Millum eldra og nýggja ættarliðið eru eisini eitt ættarlið av politikkarum, sum vit so føroysk kunnu nevna "midtergeneratiónin". Úr hesum bólki kunnu nevnast, Jóannes Ejdesgaard, Heine O. Heinesen, Hergeir Nielsen, Poul Michelsen, Hendrik Old, Edmund Joensen og Lisbeth Petersen.

### Sitið uttanfyri

Av tingmanningini í dag, eru tað tríggir tinglimir, sum hava verið uttanfyri eitt tíðarskeið, men eru síðan valdir aftur á ting.

Fólkaflokstingmaðurin, Poul Michelsen, kom fyri fyrstu ferð á ting í 1984. Hann sat á tingi fram til 1990, tá hann ikki valdi at stilla upp aftur. Í fjør varð fyrrverandi borgmeistarin í Havn tikin fram aftur, og við 293 atkvøðum í Suðurstreymi, endaði Poul Michelsen nummar trý á Fólkaflokslistanum.

Tá Bjarni Djurholm varð landsstýrismaður, trein Poul á ting aftur. Besta úrslitið hjá honum higartil var á løgtingsvalinum í 1988, tá hann fekk 560 atkvøður.

Floksfelagin hjá Poul Michelsen, Jógvan við Keldu, hevur eisini roynt at verið uttanfyri í eitt tíðarskeið. Hann varð fyrstu ferð valdur í 1988 í Norðoyggjum. Fólkaflokkurin stendur seg vanliga væl í Norðoyggjum, og flokkurin plagar í minsta lagi at fáa ein tingmann. Síðan 1980 hevur Jógvan við Keldu verið í harðari kapping við Anfinn Kallsberg um tingmannin hjá Fólkaflokkinum í Norðoyggjum.

Fólkaflokkurin fekk eitt rimmar val í 1988 í Norðoyggjum, og tað eydnaðist bæði Jógvani við Keldu og Anfinni Kallsberg at vinna sætið á løgtingið. Bert tvey ár seinni í 1990, mátti Jógvan við Keldu kortini takka fyri seg, tá hann ikki varð afturvaldur. Hann kemur kortini aftur í aftur til valið í1998, og síðan hevur hann sitið á tingi.

Triðji og seinasti maður í hesum bólki er Hergeir Nielsen úr Tjóðveldisflokkinum. Hergeir kom fyri fyrstu ferð á ting í 1984. Seinast í 1970 árunum var Hergeir eitt stutt tíðarskeið landsstýrismaður í skúla- og samskiftismálum. Tjóðveldisflokkurin hevði eitt stak vánaligt val í 1994, og í Suðuroy misti flokkurin umboðið. Serliga var tað Verkmannafylkingin, sum spældi Tjóðveldisflokkinum eitt puss hetta valið. Á sínum løgtingsvalið nakrantíð kom Verkamannafylkingin á ting við braki.

Í valdøminum hjá Hergeir Nielsen fekk Verkmannafylkingin umboðan á tingi. Forkvinnan í Føroya Arbeiðarafelag, Ingeborg Vinther, varð vald fyri Verkamannafylkingina. Góða úrslitið hjá Verkmannafylkingini hevði við sær, at Hergeir Nielsen fall til valið í1994. Longu næsta val í1998, kom Hergeir Nielsen kortini fyri seg, og vann tingsessin hjá Tjóðveldisflokkinum aftur.

| Samgonguskeið | Flokkar | Snið | Viðmerkingar |
|---|---|---|---|
| 1948-1950 | Samb.+Javn.+Sjálv | HS | |
| 1950-1954 | Samb.+Fólk | H | |
| 1954-1958 | Samb.+Fólk.+ Sjálv. | H/M | |
| 1959-1963 | Javn.+Samb.+Sjálv. | HS | |
| 1963-1967 | Fólk.+Tjóð.+Sjálv. | SS | |
| 1967-1971 | Javn.+Samb.+Sjálv. | HS | |
| 1971-1975 | Javn.+Samb.+Sjálv. | HS | |
| 1975-1979 | Javn.+Tjóð.+Fólk. | Y(V-H) | |
| 1979-1981 | Javn.+Tjóð+Fólk. | Y(V-H) | 1980 Val í úrtíð |
| 1981-1985 | Samb.+Javn.+Sjálv. | H/M | |
| 1985-1989 | Javn.+Tjóð.+Sjálv. KrF. | V/H/M | |
| 1989 februar | Fólk.+Tjóð+Sjálv.+KrF. | S/H | |
| 1989 juni | Fólk.+Tjóð+Samb. | L/S | 1990 Val í úrtíð |
| 1991-1993 | Javn.+Fólk | V/H | |
| 1993-1994 | Javn.+Tjóð.+Sjálv. | V/M | Fólk út í 1993 |
| 1994-1998 | Samb.+Javn.+Sjálv.+Verkm. | H/V | 1996-Javn. út, Fólk. Inn, 1998-Sjálv. Út |
| 1998-2002 | Fólk.+Tjóð.+Sjálv | FV | |
| 2002-2004 | Fólk.+Tjóð+Sjálv.+Mið. | SS | |

**H**=Høgra **V**=Vinstra
**M**=Mið **HS**=Heimastýrissamg.
**SS**=Sjálvstýrissamg. **L/S**= Loysing+Samband
**S/H**=Sjálvst. + Høgra **Y**=Yvirtøkusamgonga
**FV**=Fullveldissamg.

# Sjálvstýrisflokkurin er nógv drúgvastur

**Sjálvsstýrisflokkurin er tann flokkur í Føroyum, sum hevur verið í nógv flestum samgongum eftir Heimastýrislógina frá 1948. Tað eru 55 ár síðan Heimastýrislógin kom í gildið, og av teimum 55 árunum hevur Sjálvsstýrisflokkurin verið í samgongu í 43 av teimum**

LANDSSTÝRIS-SAMGONGUR

*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Hóast Sjálvsstýrisflokkurin er undir hørðum trýsti undan løgtingsvalinum 20. januar, so tala hagtølini avgjørt fyri, at flokkurin verður millum samgonguflokkarnar eftir løgtingsvalið. Føroya næst elsti flokkur hevur sitið í 13 av teimum í alt 18 samgongunum, síðan 1948. Verða hagtølini roknað í árum, so hevur Sjálvsstýrisflokkurin verið í samgongu í 43 ár av teimum 55 árunum eftir Heimastýrislógina

Teir tríggir, Sambandsflokkurin, Fólkaflokkurin og Javnaðarflokkurin hava sitið í samgongu nærum líka langa tíð, meðan hin stóri flokkurin, Tjóðveldisflokkurin, ikki hevur verið so drúgvur í samgongusamstarvum.

### Valskipanin avgerandi

Valskipanin í Føroyum verður kallað lutfalsvalskipan. Eyðkenni við londum, sum hava lutfalsvalskipan er, at tað eru vanliga nógvir flokkar, sum bjóða seg fram til at stjórna landinum. Siðvenjan er, at eftir val finna fleiri flokkar saman um at gera eina samgongu, sum skal stjórna landinum framyvir.

Sammeta vit okkum vit eitt nú Ongland, so hava teir eina tvey-flokka skipan. Labour flokkurin og tann Konservativi flokkurin skiftast um at stjórna landinum. Orsøkin til, at tað eru bert eru millum tveir og tríggjar flokkar í Onglandi er, at valskipanin er øðrvísi sett saman enn okkara.

Í Føroyum hevur siðvenjan verið, at Sambandsflokkurin, Fólkaflokkurin, Javnaðarflokkurin og seinni Tjóðveldisflokkurin, hava 85-90 % av samlaða atkvøðutalinum, meðan Sjálvsstýrisflokkurin og kristiligur flokkarnir, t.e Kristiligi Fólkaflokkurin og Miðflokkurin hava kappast um restina.

Hóast atkvøðutalið fleiri ferðir ikki hevur verið av tí størsta, so hevur Sjálvsstýrisflokkurin kortini vunnið vegin fram í flestu samgongurnar. Vanligasta samansetingin av samgongum hevur verið, at tveir av stóru flokkunum finna saman, og leggja ein av teimum smáu afturat sær.

Henda samanseting hevur givið gjøgnum árini tryggja ein meiriluta í løgtinginum. Leggjast skal afturat, at tað er ikki neyðugt í dag at hava meiriluta í tinginum fyri at vera í samgongu, men ein skal bara tryggja sær, át ein ikki hevur meiriluta ímóti sær.

Í Føroyum hava sokallaðar breiðar samgongur ikki verið vanligar, og tí hevur leikluturin hjá teimum smáu flokkunum verið avgerandi. Í hesum spælinum hevur Sjálvsstýrisflokkinum duga ómetaliga væl at gjørt sær dælt av støðuni, tí flokkurin hevur verið í nógv flestum samgongum síðan 1948. Sjálvstýrisflokkurin hevur verið í heimastýrissamgongum, høgra/mið samgongum, sjálvstýri/høgra, sjálvsstýrisamgongum og ikki minst fullveldissamgongum.

Í politisku skipanini verður Sjálvstýrisflokkurin mettur at verða ein miðflokkur. Hyggja vit at londunum rundan um okkum, so hava miðflokkar vanliga avgerandi leiklutin fyri hvørji av teimum stóru flokkunum enda í samgongu. Flokkarnir í miðuni kanna frá hvørjum flokkum besta tilboðið kemur, og síðan gera teir av um teir vilja í samgonguna ella ikki. Miðflokkar hava ikki fasta samgongufelagar, tí tað eru ikki flokkarnir sum eru avgerandi, men nærmari tilboðið frá teimum. Hetta sæst eisini aftur við Sjálvsstýrisflokkinum, sum hevur verið í samgongu við øllum flokkum upp til fleiri ferðir.